Formansfrágreiðing 2020

Enn eitt spennandi ár er vorðið søga. Týðandi stig eru tikin, og árið, ið longu er byrjað, fer væntandi at føra okkum longur á leiðini til einar atkomuligari Føroyar. Enn eru hjartamál, ið skulu fremjast, og enn hava vit nógv at gera.

Norðurlendskir fundir

Í mars 2019 flutti LUKKA inn á Bessastaðir. Vit vóru á fundi í HNR, „Handicaporganisationernes Nordiske Råd", og í Ráðnum, „Rådet för nordiskt samarbete om funktionshinder". LUKKA vísir veg til eitt betri samfelag. Forseti íslands tók væl ímóti LUKKU, og spurningurin er, hvussu norðurlond kunnu samstarva til frama fyri brekøkið. Semja er um, enn er nakað eftir á mál fyri børn, ungdóm, vaksin og eldri. Hóast londini eru ymisk, so eru avbjóðingarnar í fleiri førum tær somu.

Føroya Landsstýri svarar ST

Fyrst í apríl 2019 var MEGD til hoyring í ST hjá serfrøðinganevndini við støði í frágreiðing við evnislista "List of Issues", sum vísir á avbjóðingar á brekøkinum.

Hetta er ein spennandi tilgongd, sum kann flyta nakað, og nú hevur Føroya Landsstýrið svarað. Nakrir manglar, halda vit, men hetta gongur sína gongd, og nú skal **skuggafrágreiðing** gerast. Almannamálaráðið boðaði í apríl 2020 frá, at „innan eitt ár eftir at frágreiðingin er latin ST, verður skipað fyri einari hoyring í Genève, har serfrøðinganevndin, ið varðar av Sáttmálanum, hevur møguleika at seta nærri spurningar til innihaldið í frágreiðingini." Tað gleða vit okkum til.

Tað er evnislistin, ið MEGD vegna limafeløgini savnaði, sum liggur sum grund fyri spurningunum frá serfrøðinganevndini, sum frágreiðingin hjá Føroya Landsstýri svarar.

Samskipandi eind veruleiki

Eitt av ítøkiligu úrslitunum seinastu árini var í apríl 2019, tá ið MEGD fyri fyrstu ferð á fundi við samskipandi eindina, sum skal tryggja, at ST-sáttmálin virkar í verki á øllum økjum í samfelagnum. Hvørt landsstýrisfólk hevur ábyrgd av, at sáttmálin er settur í verk á teirra øki og hevur tí tilnevnt ein lim í samskipandi eindina.

Á heimasíðuni hjá Almannamálaráðnum stendur at lesa, at „landsstýrisfólkini eru á einum máli um, at tað er av stórum týdningi, at hetta arbeiðið verður samskipað millum ráðini, so allir okkara borgarar fáa eins góðar sømdir og møguleikar at taka lut í dagsins samfelag."

Vit gleðast um hetta við vón um, at **talsfólk á brekøkinum** skjótt eisini verður veruleiki.

Ráðstevna og lógarsmíð

„Etikkur í heilsurøkt og gransking í smásamfeløgum" var yvirskriftin á ráðstevnu í september 2019. Ráðstevnan viðgjørdi stóru etisku spurningarnar í heilsurøkt, eitt nú, hvørja atgongd skulu vit hava til heilsutænastur, raðfestingar á heilsuøkinum, privatlív og trúnaðarviðurskifti.

Eitt annað evnið, sum varð viðgjørt á ráðstevnuni, var stigmatisering í sambandi við heilsurøkt og gransking í smásamfeløgum, og kjakast varð um, hvussu vit kunnu fyrihalda okkum til hesi viðurskifti.

MEGD gjørdi eina avmarkaða kanning, sum varð løgd fram á ráðstevnuni og fyri limafeløgunum. Hon gevur áhugaverdar og hugvekjandi ábendingar um økið, sum áttu at verið granskaðir víðari.

Vit vóna, at **gransking** skjótt verður veruleiki á fleiri økjum á brekøkinum.

Eins og kanningar og granskingar hava týdning, so hevur føroyskt **lógarsmíð** stóran týdning. Í mai 2020 kundu vit t.d. fegnast um, at lógin um almannatrygd og tænastur varð samtykt á Føroya Løgtingi.

Í samband við lógarsmíð kann nevnast, at í november 2019 skipaði stjórnarskúlin fyri skeiði um avleiðingar av lógaruppskotum við støði í ST-sáttmálanum. Sambært Tingskipanini og Rundskrivi um lógarsmíð skal umsitingin greiða frá ymsum avleiðingum av lógaruppskotum í sambandi við, at viðmerkingar verða gjørdar til lógaruppskot, sum skulu leggjast fyri Løgtingið.

Endamálið við skeiðnum var at veita luttakarum, sum arbeiða í fyrisitingini, vitan og amboð soleiðis, at tað verður lættari er at orða og lýsa avleiðingar í mun til ST-sáttmálan. Christina Johannesen, Katrin Dagbjartsdóttir og Meifríð Weihe Hansen greiddi frá teirra sjónarmiðum og royndum, har gott ella minni gott lógarsmíð beinleiðis hevur týdning og ávirkan á gerandisdagin.

Barna- og ungdómsrøddir

Børn og ung eiga at hava eina rødd. Tí var MEGD í januar 2020 við á fundi í Helsinki saman við ungdómsfeløgum í Norðurlondum. Úr Føroyum vóru umboð frá Sinnisbata og ADHD-felagnum. Endamálið við fundinum var at seta orð á, **hvussu luttøka av ungum, ið bera brek, kann verða styrkt** og rødd teirra hoyrd. Umboðini vóru Rannvá Dam í Baianstovu, Asger Eið, Laura Kathrine Apol og Bára Silvansdóttir.

Eisini í september 2019 var ungdómurin settur á skrá við seminardøgum í Føroyum undir heitinum „Studentmobilitet och funktionshinder i Norden". Tosað varð um møguleikar og forðingar hjá fólki, ið bera brek, at lesa víðari á hægri lærustovnum heima og í øðrum londum.

Granskingarverkætlanin „Equity in student mobility in higher education in the Nordic region", sum Elina Lehtomäki og Kjetil Knarlag hava skrivað, lýsa hesi viðurskifti.

Nú ynsktu tey eisini at varpa ljós á hetta evnið í Føroyum. Tey ynsktu at umrøða møguleikar hjá føroyingum, sum bera brek, at útbúgva seg í Føroyum og øðrum norðurlondum, og samstundis at tosa um møguleikar hjá øðrum norðurlendingum at koma til Føroya at lesa í eitt tíðarskeið.

Á seminarinum fingu lesandi høvið til at siga frá teirra royndum. Hrafnhildur Kristbjörnsdóttir, lesandi úr Íslandi, Meifríð Weihe Hansen, Andrias Klein Gregoriussen, Áki Joensen og Hanus Samró, lesandi úr Føroyum, lýstu støðuna væl. Í stuttum kann sigast, at fólk, ið bera brek, og sum velja at lesa víðari, møta forðingum í skipanum, ið ikki eru serliga liðiligar. Av tí sama er vandin, at tey ikki fáa ta útbúgving tey droyma um.

Í hesum sambandi ynski eg at takka **Fróðskaparsetri Føroya** fyri teirra stóra áhuga fyri evninum, sum hevur avgjørdan týdning fyri framtíðar lesandi.

Hjartamál

MEGD setti fram **hjartamál** til løgtingsval 2019. Hvønn dag í tíggju dagar varð eitt hjartamál sett fram á megd.fo. Tíggju hjartamálini eru ymisk eins og brekøkið er, og tá ið hjartamál verða sett fram, so merkir tað tó ikki, at hesi eru einastu hjartamálini.

Úr úrvalinum kann nevnast óheft eftirlit við ST-sáttmálanum, bústaðir, lóggáva ímóti mismuni, brekpolitisk virkisætlan, verja, tá ið verkfall er, hóskandi upplýsingar, hagtals- og granskingartilfar, Samskiftisdepil og føroyskt teknmál sum mál í fólkaskúlanum.

Bygdaleiðir

Summi hjartamál gerast til veruleika. 1. mai 2020 byrjaði nýggja sáttmálaskeiðið um koyring av bussum hjá Bygdaleiðum, og harvið eru allir bussar hjá Bygdaleiðum atkomuligir fyri fólk, ið sita í koyristóli.

Strandfaraskip Landsins skrivar, at **„Bygdaleiðir eru nú nýggjari, grønari og rúmligari."** Hilmar Eliasen, stjóri í Strandfaraskip Landsins, fegnaðist tá um at kunna bjóða øllum, sum koyra við Bygdaleiðum komandi sjey árini, eina dygdargóða tænastu við umhvørvis- og brúkaravinarligum bussum.

Í dag er hetta veruleiki. Nú er eftir at gera tænastuna náttúrliga hjá fleiri, so hon verður til gangs og brúkt. Takk fyri SSL fyri gott og djarvt arbeiði.

Altjóða brekdagur og MEGD blað

Øll ynskja sær ein virknan og mennandi gerandisdag, og tó uppliva fleiri hvørt ár, at lívið fær eina bráa vend. Vanliga eru tey partur av einum virknum gerandisdegi, men alt í einum verður gerandisdagurin fyltur við ókendum avbjóðingum. **Hvussu møta vit hesi avbjóðing rætt?**

3. desember, altjóða dag teirra, ið bera brek, skipaði MEGD fyri tiltaki í Smæruni í Tórshavn undir heitinum „Eitt virkið lív" um luttøku í øllum lívsins viðurskiftum. At seta orð á avbjóðingar og loysnir vóru Heina í Skorini, Ph.D í altjóða politikki, Kaj Leo Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, landsstýriskvinna í almannamálum, Eyðun Christiansen, stjóri í kommunufelagnum, Hallur Thomsen, depilsstjóri í Almannaverkinum og

Marjun Poulsen, fysioterapeutur og master í heilsuvísindum. Hervør Lützen og Katrin Dagbjartsdóttir søgdu frá teirra søgu og royndum.

Smæran verður sama kvøld karmur um framsýning av barnatekningum, sum næmingar í Vágs skúla og Skúlanum í Eysturkommunu hava teknað, og nýtt MEGD-blað, ið lýsti evni **menning og endurmenning**, var til taks.

Saman gera vit MEGD sterkari

Enn eitt spennandi ár er vorðið søga. Týðandi stig eru tikin, og eg gleði meg til komandi árið. At enda **fari eg at takka tykkum**, limafeløgunum, fyri tykkara týðandi leiklut í samfelagnum og fyri gott samstarv. Tað eru tit, sum kenna avbjóðingarnar tætt inn at lívinum. Tit kenna limirnar best, og saman við tykkum ynskja vit at skapa eitt enn betri og atkomuligari samfelag. Hugaligt er eisini, at lív aftur er komið í felagið Colitis-Crohn Føroyar, og at tey hava sent umbøn um fullan limaskap aftur. Hjartaliga vælafturkomin.

Takk til Steindóru, sum er nýggja á skrivstovuni, og eisini fari eg takka aðalskrivaranum, Jónvør. Hjartaliga takk fyri gott og mennandi samstarv okkum øllum til frama.

Saman gera vit MEGD sterkari.

Takk fyri!